## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo



# GEV OKKUM EIN ROYKALARM

Í grein í blaðnum dag verður staðfest, at í tveimum førum hevur ein sjónvarpsmóttakari elvt til, at eldur er komin í hús.

Hetta er ógvuliga álvarsamt, og vit fegnast um, at løgreglan tekur slík mál í so stórum álvara, at orsøkin verður funnin.

Nógv verður gjørt burtur úr fyribyrging av ymsum slag. Seinastu dagarnar hava vit hoyrt nógv um ein húk í Klaksvík, sum setir ferðslutrygdina í vanda, og sum er í stríð við null-hugsjónina, sum hevur sum endamál, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni.

Hetta er alt mikið gott. Men vit kunnu undrast, hví so lítið verður gjørt við brunatrygd í føroyskum heimum. Øll vita, at eitt lítið bíligt tól, sum ein roykvarnari, sum kann keypast fyri lítlan penga, bjargar mannalívum. Tað er líka so vist, sum tað, at trygdarselin í bilinum bjargar mannalívum.

Kortini er eingin lóg, sum sigur, at øll heim skulu hava hesar roykvarnarar.

Tá tað ræður um trygd á arbeiðsplássum, tá eru nógvir myndugleikar á varðhaldi, og mong arbeiðspláss mugu lata loft ella kjallararúm standa óbrúkt, tí tey liva ikki upp til brunakrøvini.

Tað er mikið gott, at so nógv verður hugsað um trygdina hjá arbeiðsfólki, men tá so lítið verður gjørt burtur úr trygdini í heimunum, so heldur logikkurin líkasum ikki.

Seinastu dagarnar hevur tryggingarfelagið gjørt nógv burtur úr at greiða frá øllum gávunum til Føroya fólk. Ein fyrstuhjáltaska er send í hvørt hús. Tað er eisini í fínasta ordan.

Vit vita, at nógvir stórir skaðar og vanlukkur av eldi henda í heimunum. Tí átti tað at verið so sjálvtsagt, at eins strangar brunatreytir vórðu settar heimunum, sum arbeiðsplássunum og bilunum.

Tí ynskja vit, at til dømis okkurt tryggingarfelag keypir ein roykvarnara til hvørt húski. Tá høvdu vit verið 100% vís í, at mannalív vórðu bjargað - og uttan iva eisini stórar peningaupphæddir hjá tryggingarfeløgum og missur hjá privatfólki.



Vit vóna, at greiða fæst á málinum um sjónvarpsmóttakararnar. Eru teir vandamiklir, so eigur seljarin sjálvandi at taka teir innaftur.

Hinvegin halda vit, at myndugleikarnir eiga at taka seg saman og seta brunatrygdina í heimunum eins høgt, og trygd á arbeiðsplássum og ferðslutrygd. Latið nullhugsjónina eisini galda fyri heimini!

**Roykvarnarar eiga at vera í hvørjum heimi í landinum**

---

# 8 ár til feita pensjón

Ólíka lættari er at vera landsstýrisfólk.

Tá nýtist tær bert at starvast í átta ár fyri at náa fulla tænastumannapensjón, og tá fært tú 60% av eini landsstýrismannaløn - ella rættari um 27.000 krónur um mánaðin. Og ert tú so heppin, at tú hevur verið løgmaður eina stutta tíð eisini, til dømis í eitt ár - innan hesi átta árini, so fært tú fulla løgmanspensjón, og tá fært tú slakar 32.000 krónur um mánaðin.

Pensjónistar, sum eru so rík sum politikararapensjónistar hava helst ráð at missa grundarupphæddina í fólkapensjónini.

Og ert tú ein so heppin politikari, at aldurin hjá tær pluss tvær ferðir starvsaldurin á tingi og í landsstýrisnum tilsamans er 95 ár, so fært tú fulla feita pensjón, tá tú ert 60 ár. Og hevur tú verið á Fólkatingi, so fært tú eina feita pensjón afturat føroysku politikarapensjónini.

Soleiðis kunnu til dømis bæði Jóannes Eidesgaard og Anfinn Kallsberg fara frá við fullari feitari løgmanspensjón sum 60 ára gamlir. Teir fáa eisini danska pensjón frá Fólkatinginum...

*Ja, ójavnt er býtt, tað kunnu vit so mangan staðfesta.*

*Vit siga bara, sum George Orwell gamli segði í 1945, tá bókin Animal Farm kom út. »All animals are equal, but some animals are more equal than others.«*

*(Øll djór eru líka, men summi djór eru meira líka enn onnur)*





*Jóannes Eidesgaard og Anfinn Kallsberg eru í teirri hepnu støðu, at teir sleppa sjálvir at áseta sína løn og sína pensjón*



**Húka-finalan**

EYÐUN JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 43



**Vit eru bara menniskju í Kringvarpinum**

ANNIKA M. JACOBSEN
KJAK Á SÍÐU 13

# Lærarar missa pensjónina



Tað vóru ikki mjúk orð, sum Elsa Birgitta Petersen, fyrrverandi forkvinna í Føroya Lærarafelag, gav okkara fólkavaldu, nú lærarar hava funnið útav, at ríku pensjónistarnir skulu gjalda gildið fyri pensjónsreformin. Tænastumenn missa grundarupphæddina í fólkapensjónini á nýggjárinum, tá nýggja pensjónsskipanin kemur í gildi. Ein giftur, pensjóneraður lærari - sum er tænastumaður, missir 14,7% av eftirlønini.

Hann skal arbeiða 37 ár fyri at náa fullan eftirlønaraldur.

---



# 64 ár til loysingina

Fólk spyrja, um Dimmalætting nú er blivin loysingarblað.

»Uttan at fara inn í umstøðurnar kring fólkaatkvøðuna, so kunnu vit siga, at síðani ein meiriluti helt, at vit skuldu standa á egnum beinum, er ikki nógv hent.«

*Hetta staðfesti Dimma í oddagreinini í gjár. Tað tók altso Dimmu 64 ár at staðfesta, at fólkið valdið loysing. Vit kunnu bara ímynda okkum, hvat Georg L. Samuelsen hevði sagt, um hann visti, hvar Dimma var sokkin. Men her er so meira krút til Jóhan Petersen í fólkaatkvøðukrígnum móti Zakariasi Wang*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*